# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Takk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gjørdi mær 100 ára føðingardagin so serstakan og gleddu meg við vitjanum, gávum, blómum, talum, sangi og annars øll tit, sum sendu mær heilsan og á annan hátt mintust meg.

Harrin signi tykkum øll.

**Andreas Djurhuus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara høgt elskaða kona, mamma, omma og vermamma

**Solveig Andrea Hansen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Takk til tykkum á B6, sum vóru um hana.
Ein serlig tøkk til Birgith og Svenning av Lofti fyri umsorgan, hjálp og troystarrík orð.
Takk til Poul Færø, Dia, Hans Elmar og Eilif fyri vøkur orð og Dupult Kvartettina fyri sangin.
Stóra tøkk til tykkum øll, sum á ymsan hátt troystaðu, hjálptu til við jarðarferðini, ervinum, ringdu, komu á gátt, góvu gávu til Krabbameinsfelagið og sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

Harrin signi tykkum øll!

*Familjunnar vegna*
**Alle, Jessie, Marjun og Jógvan við familju**

## Tøkk

Eina hjartans tøkk vilja vit siga øllum teimum, sum vístu okkum samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Bergitha Petersen**
vanliga nevnd Gigga
Vestmanna

doyði og varð jarðað.
Túsund takk øll tit, sum bakaðu og á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Takk til prestarnar í kapellinum og í kirkjuni fyri góð og troystarrík orð, og til sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Missiónshúsið.
Takk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum tóku tykkum so væl av henni, tá vit komu suður við henni, og til heimahjálpirnar, sum vóru so góðar við hana.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Bjarki, Sigbjørn, Tórhild og Birita**

# Helgi Thomsen 75 ár



Hósdagin, 26. februar fyllir pápi okkara 75 ár, og fara vit við hesum at ynskja honum hjartaliga tillukku og takka fyri alt, hann er og hevur verið fyri okkum fimm systkini, mammu, versynir -dóttir og abbabørn.

Vit eru uppvaksin í einum tryggum heimi, har starv títt sum bakari var í kjallaranum, so vit hava altíð havt mammu og pápa rundan um okkum. Mamma var tær ein góður stuðul, og vit hjálptust øll at.

Sjálvt um tit høvdu nógv um at vera, høvdu tit altíð tíð til okkum. Vit minnast við gleði aftur á teir góðu túrarnar, vit hava ferðast runt um her í landinum.

Tá ið so alt broyttist, og mamma bleiv sjúk, tókst tú ta avgerð at taka tær av henni, og hevur tú nú í skjótt 14 ár passað hana. Tað eru vit tær sera takksom fyri.

Gestablíð hava tit altíð verið, heimið í Gøtu stóð altíð opið, og nú, síðani tit fluttu til Danmarkar, hevur verið upp á sama máta. Tit eru altíð til reiðar at taka ímóti okkum og øðrum, sum eru komin framvið.

Við bestu ynskjum um ein góðan dag saman, og Harrans signing í framtíðini.

**Børnini við familjum**

# Landssjúkrahúsið 85ár



Mánadagin 23. februar vóru 85 ár liðin síðan Dronning Alexandrines Hospital varð tikið í brúk. Dronning Alexandrines Hospital avloysti Færø Amts Hospital, sum var bygt í 1829. Landssjúkrahúsið var liðugt at taka í nýtslu í 1969.

Grundarsteinurin til Dronning Alexandrines Hospital bleiv lagdur 23. juni 1921 av Christian kongi X, og húsið bleiv tikið í brúk 23. februar 1924. Dronning Alexandrines Hospital avloysti Færø Amts Hospital, sum var bygt í 1829.

Grundarsteinurin til Landssjúkrahúsið bleiv lagdur 19. juni 1962 av Petur Mohr Dam, táverandi løgmanni.

Fyri skjótt 35 árum síðan, í apríl 1969, varð allur tann nýggi bygningurin tikin í nýtslu. Sjúkrahúsið var tá normerað til 158 seingjapláss.

Í 2004 varð nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum tikin í nýtslu. Bygningurin er í fimm hæddum og samlaða gólvvíddin er 5.600 ferðmetrar

Hesi 80 árini eru ómetaliga stórar broytingar farnar fram á øllum økjum, sum tað sæst á myndunum.

*mg*



*Tuberkladeildin, vanliga nevnd TB, lá nakað niðan fyri høvuðsbygningin*



*Tuberklasjúklingar í hospitalsgarðinum*



*Petur Mohr Dam, løgmaður (ovast í myndini), legði grundarsteinin til Landssjúkrahúsið í 1962*